GÍ-Hajduk Split 0-8 (0-5):

At gloyma sum skjótast

GÍ fekk av at vita, tá teir hóskvøldið tóku ímóti Hajduk Split. Talan gjørdist um størsta tap, sum føroyskt felag hevur lagt rygg til á heimavølli í europeiskum høpi, og hjá leikarunum ræður bara um at gloyma kvøldið sum skjótast

UEFA-CUP
Jákup Mørk

Gøtumenn hava í tíggju ára longu Europa-Cup søguni hjá føroyskum fótbólti ferð eftir verið teir, sum hava fingið bestu úrslitini, men hóast hetta, so var greitt, at uppgávan var meira enn vanliga torfør, tá teir hóskvøldið tóku ímóti Hajduk Split.

Ikki síðani teir fyri nøkrum árum síðani hittu Glasgow Rangers, mundu gøtumenn hava møtt einum somikið sterkum liði .Hetta varð sjónligt, tá GÍ fekk eitt – hóast alt heiðurligt – 3-0 tap við sær úr Kroatia fyri tveimum vikum síðani, og tað varð so eisini undirstrikað á Tórsvølli.

Munurin

Gøtumenn høvdu undan dystinum boðað frá, at teir ætlaðu at vera við til at skapa ein góðan dyst, men tað var skjótt greitt, at hetta fór ikki at koma upp á tal. Partvíst tí mótstøðumenninir sýntust at vera alt ov sterkir, og partvíst tí hetta als ikki var ein av bestu døgunum hjá GÍ.

Tað er nevnliga so, at munurin millum føroyskan og útlendskan fótbólt í nógvum førum er stórur, men tó hevur aloftast eydnast okkara partvíst at útjavna hendan munin við at geva seg fult og heilt út, samstundis sum mótstøðuliðini ótilvitað spara seg nakað, tí tey við sær sjálvum vita, at »at eitt føroyskt lið eiga vit at vinna«.

Av og á kemur tó fyri, at stóri munurin, sum í veruleikanum altíð er har, kemur týðiliga til sjóndar. Tað fekk HB at sanna í Tromsø, eins og B36 fekk av at vita í Gladsaxe, og hesa ferð var túrurin so komin til GÍ.

Kroatiska liðið spældi snøgt sagt gøtumenninar av vøllinum. Við kvikum samanspæli á miðvøllinum og djúpum sendingum inn um bakkarnar fingu teir ferð eftir ferð tagað GÍ liðið sundur, og neyvan mundi tað gera støðuna betri hjá GÍ, at tað eftir stuttari tíð fór at regna, so tað gjørdist enn torførari at standa á beinunum.

Líktist alla tíðina skrædlið

Tað gekk galið longu eftir 11 minuttum, men hóast kroatisku leikararnir eftir hetta skoraðu mest sum eftir vild, so høvdu teir ongan hug at seta ferðina niður.

Gøtumenn vóru sera sjáldsamir gestir framman fyri kroatiska málið, og tað sigur eisini nakað, at skuldu ganga 42 minuttir, áðrenn teir fingu fyrsta hornasparkið - sum eisini var hitt einasta hjá teimum.

Hetta gjørdist samstundis eisini upphavið til bestu GÍ-royndina í dystinum, tá Bartal nýtti flogbóltsavsettið hjá sær og sendi ein knallharðan stútari á tvørtræið. Spell hjá Bartali, og mundi ikki bøta um, at hann á heimferðini úr álopinum fekk gult kort, tá hann steðgaði kvikum kroatiskum kontraspælið. Heilt galið gjørrdist tað, tá sami Bartal bert tveir minuttir seinni nýtti hondina at beina hornaspark burtur við, soleiðis at gøtumenn máttu spæla við tíggju monnum í seinna hálvleiki.

Her sá tað eisini heilt svart út, tá Split eftir bert einum minutti økti til 6-0, men so slakaðu teir tíbetur eitt sindur. Teir hildu framvegis bóltin koyrandi kring GÍ-brotsteigin, men allar helst var nú farið at bila við nærlagninum, og í øllum førum er greitt, at var effektiviteturin bara 25%, tá talan var um góðar møguleikar, so varð tapið hjá GÍ nógv størri enn tey átta málini.

Í gloymibókina

Saman um tikið, so man tað vera sera ilt at finna nakrar glottar í avrikinum hjá GÍ hetta hóskvøldið. Hvørki úrslit ella spæl líktist nøkrum, sum føroyskur fótbóltur kann vera errin av, men tað skal tó liggja langt ífrá hugaheiminum hjá gøtumonnum at fara niður við nakkanum av teirri orsøk. Nú ræður bert um hjá teimum at leggja hendan dystin langt aftur um bak, stríðast fyri at vinna rætt til europeiska luttøku komandi ár, og so sýna øllum, at hetta var ein veruligur off-day.

Gloymið hóskvøldi GÍ, og komið sterkt aftur næstu ferð!

Vandin fyri einum fullkomnum samanbroti lúrdi, tá Bartal fekk reyða kortið beint fyri steðgin, men tíbetur vóru kroatar ikki eins nærlagnir eftir steðgin
Mynd: Álvur Haraldsen

Krzystof Popczynski hevði leiklutin sum einsamallur álopsmaður, men tað var avmarkað, hvat hann hevði at arbeiða við, tó at hann ta einu ferðina hevði ein gyltan møguleika at skora – men tá var støðan longu 0-7...
Mynd: Álvur Haraldsen

Málini

0-1: Tomislav Ercel, 11
Ante Mise ger sær dælt av leiklutinum sum fríur maður í verjuni, tá hann rekur alla GÍ hálvuna. Eitt sindur heppið fær hann bandað seg inn um GÍ verjuna, áðrenn hann leggur tvørtur um um Ercel, sum ikki hevur stórvegis trupulleikar við at skora.

0-2: Tomislav Ercel, 14
Hallur Hansen heilkiksar, tá bólturin skal sparkast út. Heldur enn at fara niðan á vøllin, fer bólturin til Zvowimir Deranja, og tá Hallur kemur ímóti, verður rullað tvørtur um til Ergec, sum hevur alt málið fyri sær.

0-3: Srdan Andric, 24
Ivica Piric dregur ígjøgnum í vinstra borðið. Í fyrstu atløgu fáa gøtumenn hálva vegna beint innleggið burtur, men tá bólturin dettur niður, heilfluktar Andric í kassan av brotsteigarmarkinum.

0-4: Srdan Andric, 33
Hajduk Split sendir hornaspark innfyri. Hallur megnar ikki at halda bóltinum, og so er Andric skjótur at koma ímillum og beina bóltin inn.

0-5: Stipe Pletikosa (br.), 45
Bartal Eliasen ger óneyðugt brotsspark – og fær reytt kort – tá hann nýtir hendurnar í hornasparksstøðu. Málverjin hjá Hajduk Split kemur upp at taka, og uttan nakað sum helst roks smekkar hann bóltin upp undir nettakið.

0-6: Mario Carevic, 46
Fyrsta álop í seinna hálvleiki endar við, at júst innskifti Carevic fær bóltin uttan fyri brotstegin. Úr 20 metrum smekkar hann til, og bólturin smoyggir sær inn um stólparótina.

0-7: Tomislav Ercel, 80
Gøtumenn fáa í fyrstu atløgu beint hornaspark út brotsteiginum. Har fangar Gudel bóltin, og tá gøtumenn eru ov seinir at trekkja út, kann Ercel úr heilt stuttari fjarstøðu stýra innlegginum frá Gudel í kassan.

0-8: Mario Carevic, 88
Aftur er talan um hornaspark, sum gøtumenn í fyrstu atløgu fáa beint útfrá. Hesa ferð fellur bólturin til Carevic, sum staddur við brotsteigarhornið smekkar til inn um nærmasta stólpan.

Einki er at siga til, um kroatiski málverjin var kaldur. At standa arbeiðsleysur í stuttermaðaru blusu á Tórsvølli, nú heystið tykist nærkast, man í øllum førum ikki vera nøkur lokkandi tilvera
Mynd: Álvur Haraldsen



Dysturin í tølum
GÍ-Hajduk Split 0-8 (0-5)
Tórsvøllur (200 áskoðarar)

0-1: Tomislav Ercel, 11
0-2: Tomislav Ercel, 14
0-3: Srdan Andric, 24
0-4: Srdan Andric, 33
0-5: Stipe Pletikosa (br.), 45
0-6: Mario Carevic, 46
0-7: Tomislav Ercel, 80
0-8: Mario Carevic, 88

GÍ: 1. Hallur Hansen – 2. Bartal Eliasen, 5. Poul Ennigarð, 4. Leivur Hansen – 14. Hans Pauli Petersen, 7. Magni Jarnskor (13. Jónred Dalheim, 89), 10. Sámal Joensen (liðf), 9. Zdzislaw Janik (6., Bárður á Lakjuni, 46.), 3. Súni Olsen (12. Magnus Skoralíð, 77.) – 8. Krzystof Popczynski
Gul kort: Poul Ennigarð, 3, Bartal Eliasen, 42, Súni Olsen, 48
Reytt kort: Bartal Eliasen, 44
Á beinkinum uttan at koma inn: 16. Mortan Joensen, 11. Páll Rói Poulsen, 17. Høgni Madsen, 18. Hanus Jacobsen

Venjari: Johan Nielsen
Hjálparvenjari: Anton Skoradal
Fysioterapeutur: Álvur Hansen
Hjálparfólk: Jørgen Gudmundsson og Janus Rasmussen

Hajduk Split: 1. Stipe Pletikosa – 4. Ivan Radeljic, 22. Ante Mise (liðf.), 23. Mato Nergtljak (24. Hrvatin Gudel, 66.) – 15. Dario Brglgs, 14. Srdan Andric (7. Hrvoje Vejic, 46.), 20. Dean Rachwica, 3. Ivivca Piric – 11. Zvowimir Deranja, 18. Dario Srna (10. Mario Carevic, 46.), 9. Tomislav Ercel
Gult kort: Dario Brglgs, 43, Ivan Radeljic, 86
Á beinkinum uttan at koma inn: 19. Hrvoje Sunara, 6. Vlatko Dolonga, 17. Hrvoje Ukkovic, 21. Dario Kiladin

Venjari: Zoran Vulic
Hjálparvenjari: Mladen Pralica
Ítróttarstjóri: Iva Surjah
Lækni: Fabian Cuken
Fysioterapeutur: Domenko Sizgored

Dómari úr Ukraina: Yarmenchuk

Ikki tómhentur

Hóast styrkismunin, hetta, so eru tað slíkir dystir, sum geva leikarunum »hár á bringuna«, helt Henrik Larsen í hálvleikinum hóskvøldið

Hóast stóra styrkismunin, sum var eyðsýndur á Tórsvølli hóskvøldið, so metti landsliðsvenjarin seg kortini fáa okkurt burtur úr at hyggja

FÓTBÓLTSPRÁT
Jákup Mørk

Ein av áskðarunum á Tórsvølli hóskvøldið var landsliðsvenjarin, Henrik Larsen, og tó at tað helst mundi vera avmarkað, hvat hann fekk burtur úr dystinum, so hevði hann sína greiðu ætlan við vitjanini.

- Tað røður fyrst og fremst um hjá mær at síggja, hvussu Súni Olsen og Sámal Joensen eru fyri. Tað kann væl vera, at teir ikki fáa gjørt so nógv við heildina, tá munurin á liðunum er somikið stórur, men so fái eg í øllum førum sæð teir spælt undir stórum trýsti, eins og eg kann meta, hvussu teir standa seg í støðum, ein ímóti einum.

Um sjálvan dystin helt venjarin annars í hálvleikinum, at her var nokk ikki tað stóra at tosa um.

- Nei. Støðan sigur jú tað mesta. Har er ein sera stórur styrkismunur millum liðini, men hóast hetta, so eru tað slíkir dystir, sum geva leikarunum »hár á bringuna«, so tað átti kortini at verið nakað, sum kann verða partur í teirra menning, helt Henrik Larsen at enda.

Fríggjadagin fór Henrik Larsen aftur til Danmarkar, og týsdagin gongur leiðin so aftur upp á klettarnar, tá fyrireikingarnar til landsdystin móti skotum av álvara fara ígongd.

1. deild menn

		d	v - j - t	v mál	t mál	+/-	stig
1	NSÍ	13	8 - 3 - 2	25	13	12	27
2	HB	13	8 - 2 - 3	37	17	20	26
3	KÍ	13	8 - 2 - 3	30	16	14	26
4	B36	13	7 - 2 - 4	39	20	19	23
5	GÍ	13	7 - 1 - 5	23	22	1	22
6	B68	13	5 - 5 - 3	19	18	1	20
7	VB	13	4 - 4 - 5	10	9	1	16
8	EB/Streymur	13	3 - 2 - 8	16	30	-14	11
9	TB	13	1 - 3 - 9	13	47	-34	6
10	Skála	13	0 - 4 - 9	9	29	-20	4

2. deild menn

		d	v - j - t	v mál	t mál	+/-	stig
1	FS V	13	9 - 3 - 1	41	9	32	30
2	KÍ	13	5 - 4 - 4	21	18	3	19
3	B36	13	5 - 4 - 4	18	21	-3	19
4	B71	13	5 - 3 - 5	22	14	8	18
5	Sumba	13	5 - 3 - 5	17	25	-8	18
6	ÍF	13	5 - 2 - 6	29	27	2	17
7	NSÍ	13	5 - 1 - 7	13	23	-10	16
8	VB	13	5 - 1 - 7	16	35	-19	16
9	LÍF	13	4 - 3 - 6	21	23	-2	15
10	HB	13	4 - 2 - 7	19	22	-3	14

1. deild kvinnur

	d	v - j - t	v mál	t mál	+/-	stig
KÍ	5	5 - 0 - 0	31	5	26	18
B36	5	4 - 0 - 1	12	7	5	14
HB	5	2 - 0 - 3	11	9	2	6
GÍ	4	2 - 0 - 2	6	17	-11	6
B68	4	1 - 0 - 3	7	10	-3	4
Skála	5	0 - 0 - 5	6	25	-19	0